

# KINGOROKKUR HOYVÍKAR KIRK

**SÁLMAR** Gomlu, klassisku sálmarnir koma aftur til heiðurs, nú Heini Lützen gevur fløguna »Sálmar« út. Í hesum sambandi hevði hann útgávukonsert í Hoyvíkar kirkju 2. hvítusunnukvøld

Inna Tørnroos

Heini ávarar longu áðrenn hann byrjar, at tað kann vera, at fólki nýtist oyraproppar. Kanska ikki tað vanligasta at hoyra í einum kirkjurúmi, men so er henda tulking av gomlu sálmunum heldur ikki heilt vanlig.

Heini innleiður konsertina við sálmi 67: »Eg vil mínum Harra prísa«. Flestu av sálmunum, ið Heini hevur valt út, eru av teimum elstu í sálmabókini.

– Sálmarnir hjá Kingo og Ingemann, ið eru skrivaðir í 16-1700-talinum, eru klassikarar. Tað, at teir hava yvirlivað so leingi prógvar teirra virði, sigur Heini millum tveir sálmar.

Honum dámar væl gomlu løgini, men helst eru tað orðini, ið tiltala. Sum dømi nevnur hann sálm nr 1 í sálmabókini »Harra Guð, títt dýra navn og æra«, sum skaldið Petter Dass yrkti 1698.

## Væl dempað

Eini 320 fólk høvdu leitað sær til kirkjuna í Hoyvík. Grundin til, at Heini valdi at hava útgávukonsertina har, er at nýggja kirkjan er ein av teimum best dempaðu kirkjurúmum í Føroyum.

Nógvir av gomlu sálmunum eru langir, eini 13 ørindi, men Heini hevur stytt teir niður í eina helvt. Allir sálmirnir uttan tann eini eru úr sálmabókini. »Eg livi og veit«, ið Victor Danielsen hevur týtt, er úr Guds fólks sangbók.

Tónleikaligi heilin aftan fyri fløguna og útgávukonsertina er klaverspælarin Gunnar Guttesen. Saman við hinum tónleikarunum, Rúna Eysturlíð, á elguitar, Svend Åge Drewsen á bassið og Jósva Debes á trummum vóru teir perfekta ramman um røddina hjá Heina.

*inna@sosialurin.fo*

*Myndir: Álvur Haraldsen*